# Dánjal Nielsen 80 ár



Í dag týsdagin 10. september fyllir Dánial P. Nielsen 80 ár. Dánjal, sum er ættaður úr Sandavági, hevur búð meginpartin av lívi sínum í Klaksvík. Foreldur hansara vóru Kristianna og Tummas Nielsen. Kristianna var ættað av Ryggi í Miðvági og Tummas var sonur Onnu Sofíu og Dánial Petur Nielsen, ið var skómakari, keypmaður og postmaður Úti á Bakka í Sandavági.

Í 1945 giftist Dánjal við Onnu Joensen, dóttir Viktorinus, ættaður av Viðareiði og Elisabeth Michelsen, kallað Betta, ættað úr Árnafirði. Tey bæði, sum giftust í 1919, bygdu Eysturi í Horni á Viðareiði, men í 1929 fluttu tey til Klaksvíkar at búgva. Anna og Dánjal eiga fýra børn. Tey eru Jona, Kristianna, Bergfríða, ið vanliga verður kallað Begga og Viktur.

Á ungum árum fór Dánjal til Havnar at fáa sær skrivstovuútbúgving. Seinni kom hann til Klaksvíkar at arbeiða á skrivstovuni hjá P/F. J. F. Kjølbro. Nøkur ár seinni tók hann við sum skrivstovustjóri hjá Føroya Bjór, og í sekstiárunum stovnaði Dánjal Nielsen egið bókhaldsvirkið við navninum Føroya Bók. Tá Dánjal gavst at arbeiða, yvirtók sonurin Viktur bókhaldsvirkið og annað virksemi, sum er knýtt at fyritøkuni.

Dánjal var millum teirra, sum í 1960 tóku stig til at stovna partafelagið Norðoya Samvinnufelag, og varð litið honum upp í hendi at vera stjóri í felagnum. Samvinnufelagið bygdi og rak tvey línuskip. Norðingur varð bygdur í 1961 og Norðaldan í 1969. Frá 1970 til 1990 var Dánjal P. Nielsen stjórnarlimur í Realkredittstovninum og frá 1985 til 1989 var hann eisini dagligur leiðari á stovninum.

Dánjal hevur eisini røkt onnur álitisstørv. M. a. var hann formaður í fyrstu líkningarnevndi hjá Klaksvíkar kommunu. Hann varð valdur at røkja hetta álitisstarv av javnaðarumboðunum, sum tá sótu í kommunustýrinum. Eisini hevur hann umboðað Javnaðarflokkin í Klaksvíkar býráð. Har var hann nøkur tíðarskeið sum varamaður. Hann hevur eisini verið valevni fyri javnaðarflokkin til løgtingsval.

Um Dánjal Nielsen er í stuttum at siga, at hann hevur verið og er ein skilamaður og ein álitismaður burtur av. Hann er ein sera stillførur maður. Í arbeiðsárunum var hann sera nærlagdur, dugnaligur og fram um alt arbeiðsamur og røkin.

Við vón um góð ellisár ynskja vit Dániali hjartaliga tillukku við 80 ára degnum. Somuleiðis ynskja vit Onnu, børnunum og næstringum annars alt gott í framtíðini.

Klaksvík, 7. september 2002
Vinarlig heilsan
**Vilhelm Johannesen**

# Næmingar av Felagsskúlanum í starvsvenjing í Havn

**Mánadagin 2. september fór 9. flokkur í Felagsskúlanum á Oyrarbakka í starvsvenjing. Vit hava spurt floksfelagar okkara, hvussu teimum dáma at verða í starvsvenjing**

*Emma Hansen og Brynhild H. Reinert, praktikantar*

**Navn: Olga Kruse.**
**Praktikpláss: Griffilin í SMS.**
Hví valdi tú at fara í starvsvenjing í Grifflinum?

Tí eg vildi royna at arbeiða í handli.

Hvat gert tú her?

Eg seti prís á vøruna, ruddi hillar og standi við kassan.

Hvussu dámar tær í Grifflinum?

Mær dámar væl. Fólkini eru fitt og hjálpsom.

Hevði tú tímað at arbeitt í handli?

Ja, kanska.

**Navn: Súsanna Isakssen.**
**Praktikpláss: Hotel Hafnia.**
Hví valdi tú at fara á Hotel Hafnia?

Eg vildi vita, hvussu tað er at arbeiða á einum hotelli.

Hvussu dámar tær?

Væl. Fólkini, sum arbeiða her, eru fitt og hjálpsom.

Hvat gert tú her?

Eg dekki borð.

Ætlar tú tær at arbeiða á hotelli seinni?

Nei, tað ætli eg mær ikki.

**Navn: Fróðbjørt Andreassen.**
**Praktikpláss: Farstøðin.**
Hví valdi tú at fara á farstøðina?

Eg vildi royna at arbeiða innan ferðavinnuna.

Hvat gert tú her?

Eg rópi á bussarnar, taki telefonina og avgreiði pakkar til farmaskip.

Hvussu dámar tær á farstøðini?

Mær dámar væl. Fólkini eru fitt.

Hevði tú tímað at arbeitt her seinni?

Ja, tað hevði eg.

**Navn: Brian L. Festirstein.**
**Praktikpláss: DB Bilar**
Hví valdi tú at fara í starvsvenjing her?

Eg vildi sleppa at royna, at arbeiða á einum bilverkstaði.

Hvat gert tú?

Eg skifti bremsur og olju.

Hvussu dámar tær her?

Mær dámar væl. Her er stuttligt, og teir hjálpa mær, um tað er okkurt, eg ikki dugi.

Hevði tú tímað at arbeitt her seinni?

Nei, eg hevði ikki tímað at arbeitt við bilum.

**Navn: Beinta Ellingsgaard og Bjørg Ellingsgaard.**
**Praktikpláss: Svimjihøllin í Havn.**
Hví valdu tit at fara í svimjihøllina?

Til stuttleikar. Vit vildu royna, hvussu tað er at arbeiða í eini svimjihøll.

Hvat gera tit?

Frá kl. 8-10 gera vit sum vit vilja. Vit kunnu svimja o.t. So vaska vit ymiskt í 2 tímar. Síðan hava vit pausu. Tá pausan er liðug, vaska vit í 1 tíma, og so hava vit frí.

Hvussu dámar tykkum her?

Okkum dámar væl. Her er stuttligt at verða, og fólkini eru fitt.

Høvdu tit tímað at arbeitt her?

Nei, tað høvdu vit ikki. Vit hava aðrar planir.



*Olga Kruse*



*Súsanna Isakssen*



*Beinta Ellingsgaard og Bjørg Ellingsgaard*



*Fróðbjørt Andreassen*





*Brian L. Festirstein*



Ivan Klein Olsen:

# Onki hokus pokus við grindabýti



*Ikki alt kemur upp listan, sum hongur uppi fyri at vegleiða teir sum eiga drápspart. sigur sýslumaðurin Ivan Klein Olsen*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

GRIND
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Lesarar hava verið ónøgdir við grindabýtið í seinastu grindini í Havn. Grindin varð máld til 388 skinn og av hesum vóru bert 176 skinn býtt til drápspartar. Talið 176 fekkst við at telja skinnini á listunum sum hingu uppi á Vestaru bryggju. Av teimum 42 hvalunum, fóru 15 til drápspartar, fýra til stovnar og lesarar hava sprut hvat hendi við teimum 23 hvalunum, sum eftir vóru.

-Tað er einki løgi við grindabýti og eg sum sýslumaður havi grindareglugerðina at halda meg til og einki annað. Í grindareglugerðini er neyvt útgreinað hvussu ein grind skal býtast, sigur Ivan Klein Olsen, sýslumaður í Norðstreymoy. Tað er hann sum stedur fyri grindabýtinum í Havn eisini.

-Tað vóru ikki 176, men 226 skinn, sum vóru býtt til drápspartar og hesi vóru sundur í 642 partar ella 1/3 skinn í part. Grindalistin er bara fyri at hjálpa teimum sum hava verið í drápinum at finna sín part og tað er ikki vist, at alt stendur har, sigur Ivan Klein Olsen, sýslumaður.

-Eftir vóru 162 skinn og tey vóru býtt soleiðis eftir grindareglugerðini. Finningarfiskur 19 skinn. Vaktarhald 1 skinn. Metingarløn 4 skinn. Sýslumaðuin, tvey prosent av grindini, tilsamans 8 skinn. Grindaformenn, eitt prosent av grindini, fimm grindaformenn og hetta gav tilsamans 20 skinn. Skaðasýn 1 skinn. Skiftishjálp, tað er samsýningin sum kommunalu stovnarnir, ið eru við í grindini fáa, eitt nú brandstøðin, politi, Tórshavnar Havn, teir sum syrgja fyri trukkum o.s.v. víðari fáa. Skiftishjálpin var i seinastu grindini 50 skinn. Spilla 6 skinn. Restin 53 skinn fóru til ymiskar almennar stovnar, eitt nú ellisheimið, Láargarð og landsjúkrahúsið fekk ein 15 skinns fisk, sigur Ivan Kelin Olsen, sýslumaður.


**Støðleiðari til Shell í Klaksvík**

Í sambandi við at P/F Føroya Shell yvirtekur Shell Quick Service frá Dávu Joensen og at avgreiðsluskrivstovan í Norðoyggjum samstundis verður flutt av Grótrætt inn á støðina, verður við hesum søkt eftir leiðara.

**Starvið:**
Vit kunnu bjóða eitt sera spennandi starv, sum bæði fevnir um dagligu leiðsluna av Shell-støðini, av øllum søluarbeiðinum, rakstrinum og av umsiting okkara í Norðoyggjum. Samstundis umfatar starvið eisini ábyrgdina av goymsluni á Grótrætt.

**Eginleikar:**
Vit ímynda okkum at umsøkjarin

- hevur góð leiðsluevni
- er ein góður seljari
- er íðin og ógrýtin
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- er miðvísur og framsøkin
- hevur staðkunnleika
- er fjølbroyttur og smidligur
- hevur ordanssans
- er dugnaligur í samstarvi við viðskiftafólk og starvsfelagar
- tekur undir við handilsmeginreglunum hjá Shell (sí www.shell.fo)

**Løn:**
Vit bjóða eina góða løn við eftirlønarskipan, ið verður ásett í samsvari við útbúgving og royndir.

**Umsóknir:**
Áhugað kunnu senda umsókn við neyðugum skjølum og merkt "Leiðari Klaksvík" til P/F Føroya Shell, Viðarnes, 100 Tórshavn, í seinasta lagi 30. sept. 2002. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum kunnu setast til Erling í Liða, sølu- og marknaðarleiðara ella Hákun Djurhuus, stjóra á telefon 347400.

P/F Føroya Shell hevur deildir í Klaksvík, Suðuroy, Eysturoy og Tórshavn. Tað eru 10 Shell-støðir kring landið og uml. 100 fólk starvast hjá Shell í Føroyum. Shell eigur og rekur eisini tangaskipið "MAGN". Árliga umsetur Shell fyri uml. 400-500 mió kr. Virksemið hjá Shell í Føroyum hevur síðani 1973 verið í føroyskum partafelag, sum er ein partur av Royal Dutch Shell.

www.shell.fo



Toftild Alternativt Hår

NÝTT HÁR!





HOTEL HAFNIA (Loftið)
Leygard. 14. september og sunnud. 15. september frá kl.14.00 - 19.00

SJÓMANSHEIMIÐ Í KLAKSVÍK
Mánad. 15. september kl.12.00 - 18.00

Vinarliga ring og bílegg tíð

Nú koma vit aftur á vitjan í Føroyum.



HENNING TOFTILD
Toftild Alternativt Hår
RUDOLFI PLADS 9 DK-9000 AALBORG
TLF.: 98 10 32 11 FAX: 98 13 36 22
www.alternativ-haar.dk